# Føroyska Anna Nygaard í X-Factor

**Nú er greitt, at vinnarin av Ársins Songrødd 2008, Anna Nygaard, verður við í X-Factor kappingini komandi fríggjakvøld, og sambært DR verður hon væl móttikin av dómarunum**

Anna Nygaard, sum vann Ársins Songrødd 2008, er at síggja á heimasíðuni hjá DR, í yvirlitinum yvir, hvat verður í sendingini komandi fríggjadag.

Og nú vísir DR eina reklamu fyri sendingina fríggjadagin, og har er greitt, at Anna Nygaard fer víðari til næsta umfar.

Anna Nygaard er ikki ókend í Føroyum. Hon hevur ferðast kring landið síðani hon gjørdist tann greiði vinnari av Ársins Songrødd 2008, og hevur hon framført nógv í hesum sambandi.

Á heimasíðuni *dr.dk/xfactor* sæst, at komandi fríggjadag verður Anna við til audition í X-Factor, og ílatin einari føroysku Guðrun og Guðrun troyggju, megnar hon at bergtaka dómararnar við síni vakrari rødd.

Hon syngur lagið hjá Etta Jamse við heitinum ”At Last”.

Her er leinkjan:
http://www.dr.dk/DR1/xfactor/forside.htm



Sálarfrøðingur:

## X-Factor elvir til happing

- Dómararnir í X-Factor leggja upp til, at tað er í lagið at happa tey, sum onkursvegna ikki passa inn, sigur Anna D. Hentze, sálarfrøðingur og limur í Miðlaráðnum.

X-Factor er komið aftur á breddan og innleiðandi umførini eru byrjaði.

Tann nógv kritiseraði dómarin Thomas Blachman er ikki longur við í dómaratrioini, men kortini eru orðini frá dómarunum heldur hvøss og beinrakin, og fingrar verða ikki lagdir ímillum, tá ið tey, sum ikki egna seg sum sangarar royna seg í kappingini.

- Hyggjaraskarin hjá X-Factor er stórur, og har sita tríggir autoritetspersónar, sum vísa teimum ungu, at tað er í lagið, at happa og gera gjøldur burturúr teimum, sum ikki duga so væl, sigur Anna D. Hentze.

Anna D. Hentze er sálarfrøðingur, og millum annað tiltakslimur í Miðlaráðnum, sum hevur til endamáls at leiðbeina og kunna almenningin um góðan sið og vandamál innan filmar, telduspøl, alnót, blogg, fartelefon við meira. Hon heldur ikki, at X-Factor lærir ungum hvussu tey skulu uppføra seg mótvegis øðrum.

- Dómararnir virka ofta sum fyrimyndir, og tey stúra ikki fyri, at gera gjøldur burtur úr luttakarum, sum ikki klára seg væl. Tað kann elva til, at tey ungu halda tað er í lagi at happa onnur, sigur Anna D. Hentze.




Søkt verður eftir
Timburlærlingum
at byrja skjótast tilber.
Áhugaðir kunnu venda sær til skrivstovu okkara ella til Jón Danielsen á tel. 210.683.
ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705




Søkt verður eftir royndum
Timburmonnum
at byrja skjótast tilber.
Áhugaðir kunnu venda sær til skrivstovu okkara ella til Jón Danielsen á tel. 210.683.
ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705

www.pitstop.fo
Verkstaðsleiðari/ Mekanikari søkist
Verkstaðsleiðari/mekanikari søkist til PITSTOP á Hjalla at byrja beinanvegin.
Sveinabræv og koyrikort er krav.
Áhugaði kunnu ringja á tlf. 520 522
PITSTOP.FO
Pitstop | á Hjalla 35 | Tel. 320 322